# gin hjá Framherja á Hotel Føroyum





røður hildnar, og fólk vóru í góðum hýri.

Tey, sum vóru við til hátíðardagin, lata ógvuliga væl at og siga, at fyriskipingin var rættiliga professionell og eydnaðist til fulnar.

## Gott ár í fjør

Verksmiðjutrolarin, Akraberg, hevði annars eitt ógvuliga gott ár í fjør, nevniliga tað besta, síðan Framherji keypti skipið.

Teir fiskaðu fyri stívliga 60 miljónir krónur og reiðarin, Anfinn Olsen, sigur, at høvuðsorsøkin til góða úrslitið er, at teir í farna ári flaggaðu ímillum føroyskt og íslendskt flagg, sum hann tekur til, tó alla tíðina við føroyskari manning.

Síðan Framherji keypti Akraberg fyri 10 árum síðan, hevur raksturin øll árini borið seg.

– Men árið í fjør er so tað besta hjá okkum, sigur reiðarin, Anfinn Olsen.

## Kona og maður

Tey, sum eiga felagið Framherja, eru Anfinn Olsen, sum eigur ein triðing, konan, Eliasabeth Eldevig Olsen, sum eigur ein triðing og íslendska felagið, Samherji, sum eigur seinasta triðingin.

Við Akrabergi eru einir 30 mans og við Høgaberg, sum er kombineraður nóta- og trolbátur, eru 13-14 mans, tá ið teir royna við nót og 10-11 mans, tá ið roynt verður við troli.

Øll árini hevur raksturin hjá Akrabergi givið avlop og hjá Høgabergi, sum er lutfalsliga nýggjur í »familjuni«, hevur raksturin eisini hingið saman.